

*Gunhild Jacobsen úr Hoyvík eigur mong sporini her á Zarepta. Í farnu viku var hon aftur á ungdómslegu*

# Vel vinin besta

**Á hvørjum ári leita hundraðtals ung sær á eina av summarlegunum á Zarepta. Ein teirra, sum hevur verið her fleiri ferðir, er 16 ára gamla Gunhild Jacobsen úr Hoyvík. – Eg eri komin higar fyri at hoyra um Jesus, sigur hon**

UNGDÓMSLEGUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Vatnsoyrar:** Í farnu viku var Gunhild Jacobsen saman við 159 øðrum á teirri eldru ungdómsleguni í Zarepta.

Legan byrjaði sunnudagin og tá Sosialurin vitjaði í Vatnsoyrum hósdagin, vóru bert tveir dagar eftir av henni.

Fyrri um morgunin høvdu tey etið morgunmat, havt morgunfimleik og morgunandakt á kørmunum, og høvdu haraftrat ruddað hesi til lítar.

Veðrið var av tí allarfagrasta henda dagin, og tey ungu stuttleikaðu sær uttanfyri eina stutta løtu, áðrenn næsta punkt var á skránni kl. 10.

Alt spæl helt tó uppat, og tá boðað varð til bíbliutíma og sangløtu í stóra salinum, var Gunhild sjálvandi við. Seinnapartin var ætlanin at fara ein longri gongutúr niðan á Fjallavatn.

Umframt hesa ungdómsleguna eru seks aðrar summarlegur, eins og eina rúgvu av øðrum legum her í Vatnsoyrum. Hvørt summar eru um 1100 børn og ung úr øllum landinum á Zarepta.

- Tað eru eisini tvey onnur góð ting við at vera her: Ein fær nýggjar vinir, og ein hittir teir gomlu vinirnar aftur, sigur henda 16 ára gamla hoyvíksgentan.

Høvuðsleiðari á hesi ungdómsleguni var porkeningurin John í Skemmuni og hjálparleiðari Kirstin Samuelsen úr Fuglafirði.

**Sama endamál í 40 ár**

Á stórum tiltaki í fjør varð



*Tey 160 ungu syngja av hjartans lyst afturvið góðum forsangarum og tónleikarum*